


**Nr. 13** *22. juni 2025* **85. árg.**

# Trúgvin á Gud broytir alt

*Birger Wroldsen*

Trúgvin á Gud broytir alt. Tað er hon, sum ger allan munin. Vit skulu mata okkara anda við Guds lyftum. Fólk flest taka eina vitamintablett á morgni. Vit skulu samla okkum skriftstøð, har Gud gevur okkum eitt lyfti. Sovorðnar andaligar tablettir taki eg morgun, middag og kvøld, t.d.: „Eg orki alt í honum, sum ger meg sterkan!“ Fil. 4,13 og „Bikar mítt yvir flýtur.“ Sálm. 23,5 Ja, gleðisbikarið flýtur yvir. Vísindamenn hava kannað báðar heilahálvurnar. Onnur helvtin virkar, tá ið alt virkar tungt, deprimerandi og myrkt. Hin helvtin virkar, tá ið alt er ljóst og lætt, og vit syngja lovsong. Nú hava teir so funnið útav, at báðar helvtirnar kunnu ikki virka samstundis: Altso, eru vit deprimerað, **SO ER AT SYNGJA LOVSONG**, tí tá kann tann myrka helvtin ikki arbeiða og virka.

Tað týdningarmesta í Bíbliuni er krossurin. Uttan krossin er eingin loysn upp á syndatrupulleikan, sum er menniskjans størsti trupulleiki. Men vegna krossin er tann boðskapurin hæddarpunktið, klimaksið í Bíbliuni. Vit hava eina loysn upp á menniskjans størsta trupulleika, syndatrupulleikan. „Tí at væl er orð krossins dárskapur fyri teimum, sum glatast, men **FYRI OKKUM, SUM VERÐA FRELSTIR, ER TAÐ GUDS KRAFT**.“ 1. Kor. 1,18. Ja, sanniliga, orðið um krossin er Guds kraft til frelsu.

Jesus tók okkara syndir og sjúkur upp á krossin. „Men hann varð **SÆRDUR VÁRA SYNDA VEGNA** og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av **SÁRUM HANS FINGU VIT HEILSUBÓT**.“ Jes. 53,5. Í orðinum um krossin liggur lykilin til veking og grøðing.

Latið ikki Kristi kross tømast fyri kraft. „Tí at Kristus sendi meg ikki út at doypa, men at boða gleðiboðskapin, **IKKi Í ORÐAVÍSDÓMI,** til tess at **KROSSUR KRISTS IKKI SKULDI VERÐA GJØRDUR TIL EITT BERT EITI**." 1. Kor. 1,17 Tað ber altso til at brúka so háfloygd orð, so at fólkið ikki skilir, hvat ið meinast við hesa talu, og tá tømist kraftin út úr Kristi krossi. Og víðari sigur Paulus: „Tí at skrivað stendur: „Eg vil týna vísdóm vísmanna, og vitsku vitra manna vil eg gera til einkis. Hvar er vísmaður? Hvar skriftlærdur? Hvar orðakappi í hesum heimi? Hevur Gud ikki gjørt til dárskapar vísdóm heimsins? Tí at við tað at heimurin við vísdómi sínum ikki kendi Gud í vísdómi Guds, líkaði tað Gudi við boðanardárskapi at frelsa tey, sum trúgva." 1. Kor. 1,19–21.

Paulus slær fast, at hann brúkar ikki vísdómsorð, tí endamálið við prædikuni er, at fólk skulu skilja boðskapin, tí brúkar hann ikki klók og yvirtalandi orð: „Tala mín og boðan mín var ikki við sannførandi vísdómsorðum, men við ásannan av anda og kraft." 1. Kor. 2,4. Hetta er tann reini dárskapur fyri verðini, men fyri okkum, sum verða frelst, er tað Guds kraft. 1. Kor. 1,18.

Fólk eru ógvuliga djørv djevulsins vegna, og tey skamma seg heldur ikki av tí; men vit skulu vera **DJØRV GUDS VEGNA**. Altso tað, sum um ræður, er ikki at vera so orðakringur og duga væl at málbera seg, men bera tað so einfalt fram, at øll skilja, hvat ið tú sigur. Tá virkar Guds kraft, tí tá sleppur tú Guds Anda framat.

Eg havi talað nógv í Afrika. Har hava tey eitt, sum tey nevna „ein játtanar anda". Tey tala tað út, sum ikki er til, sum **var** tað til. Hvat hendir so hjá teimum? **TÁ BLÍVUR TAÐ TIL**. Hetta er júst tað, sum Skriftin sigur: „Hann, sum kallar tað, sum ikki er til, sum var tað til." Róm. 4,17. Hetta er trúarandi, og trúgvin krevur ikki annað prógv enn Guds lyfti.

*Effie Campbell* umsetti.

# At vera øðrvísi

Eini prestahjún yviri í Amerika komu koyrandi í bili sínum. Útvarpið hevði boðað frá ódn, og ódnirnar har yviri kunnu vera rættiliga ógvisligar. Regnið oysti niður, og viskararnir gjørdu lítlan mun. Stormurin var longu rættiliga harður.

Tey koyrdu ígjøgnum eitt øki, har eitt sinnissjúkrahús var. Sjúklingarnir her vóru ógvuliga vandamiklir, ja, lívshættisligir. Tí vóru uppsløg sett allastaðni. Á teimum stóð: „Takið ikki tumlarar upp í bilin!“

So komu tey til eina brúgv. Varisliga koyrdu tey út á brúnna. Mitt á brúnni síggja tey ein mann. Hann var nakin oman belti og stóð og veittraði ógvisliga við skjúrtuni, meðan regnið oysti niður yvir hann. Hann sá ógvuliga vandamikil út.

Prestur steðgaði bilinum. Hann slapp ikki víðari fyri manninum. Tey sótu eina løtu still, tey vistu ikki, hvat tey skuldu gera. So sigur prestur: „Eg fari út.“

„Nei, nei,“ rópti konan, „sært tú ikki, hvussu svakur hann er?“

„Sit tú bara kvirr. Eg skal læsa bilhurðina,“ segði prestur uggandi. Tá ið prestur kom yvir ímóti manninum, rópar hann: „Brúgvin er brotnað. Áin er farin avstað við henni. Ein bussur við børnum er longu farin útav.“

Meðan maðurin varð standandi á brúnni, fór prestur at ringja eftir politinum, sum kom og sperraði brúnna av, so ikki fleiri vanlukkur skuldu henda.

Hetta er ein sonn frásøgn, og hon setir nógvar tankar í gongd. Maðurin, sum stillaði seg mitt á brúnna, sá „svakur“ út. Men hann bjargaði mannalívum. Vilja tú og eg sum hann „stilla okkum í skarðið“ og rópa varskó til fólk okkara, sjálvt um heimurin metir okkum sum dárar og undarlig?

Vegirnir, sum fólk ganga á, eru mangir. Teir kallast: Buddha, Kungfutse, Islam, Muhamed, Moon, Transcendental Meditation, Scientology og nógvir aðrir. Fólk halda, at allir hesir vegir føra til sama málið, Himmalin. Men tað er skeivt. Tað er bara **ein** vegur, sum førir upp hagar, og hann eitur Jesus. „Jesus er vegurin og sannleikin og lívið.“ Jóh. 14,6. Allir aðrir vegir føra niðureftir, niður í avgrundina, niður í glatan. Einasta navnið, sum er givið menniskjum til frelsu, er Jesu-navnið. Áps. 4,12.

Í heimsins eygum síggja tey trúgvandi „løgin“ og „ør“ út. Serliga um tey eru ágrýtin at sáa og rópa varskó. Men tað bilar einki, tí tey bjarga mannalívum eins og maðurin á brúnni.

Vilja tú og eg síggja „løgin út“ fyri Jesusar skuld? Hví skulu vit nú tað? Tað er jú nógv lættari at hugna sær og slappa av. Svarið er einfalt, og tað stendur í tí kenda skriftstaðnum Jóh. 3,16: „Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin

einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, **ikki skal glatast**, men hava ævigt lív.“

Vit skulu rópa varskó, fyri at tey ikki skulu glatast! Í Ezekiel 3,18–19 stendur tað uppaftur álvarsligari: „Tá ið eg sigi við hin gudleysa, at hann skal doyggja, og tú ikki varar hann við og ikki biður hann víkja frá sínum vonda vegi til tess at bjarga lívi sínum, tá skal hin gudleysi fullvæl doyggja fyri misgerð sína, **men blóð hansara vil eg krevja av tíni hond**. Men varar tú hin gudleysa við, og hann tó ikki víkur frá gudloysi sínum og vonda vegi, tá skal hann doyggja fyri misgerð sína, men tú hevur bjargað lívi tínum.“

*Effie Campbell.*

# Mitt í eini ruðuleika merktari verð

*Vit, sum lesa Guds orð og fylgja Jesusi, vita:*

GUD ER FRIÐUR MÍN!
GUD ER UGGI MÍN!
GUD ER GLEÐI MÍN!
GUD ER STYRKI MÍN!
GUD ER MÍTT ALT!
Í DAG – Í MORGIN – UM ALDUR OG ALLAR ÆVIR!
Tú svevur væl, tá ið tú staðin fyri at stúra,
lítur á Guds lyfti, m.a. í Sálmi 18,32–36.

„Hvør er Gud uttan Harrin?
Hvør er ein klettur uttan vár Gud?
Hann gevur mær styrki.
Hann slættar vegin framman fyri mær.
Hann ger fet míni trygg eins og hindin.
Hann gevur mær fótafesti uppi á hæddunum.
Hann venur armar mínar, so eg kann spenna koparbogan.
Harri, tú ættir mær tína frelsu sum ein skjøldur,
tú styðjar meg við høgru hond tíni,
hjálp tín ger meg sterkan.“
ER ORÐ GUDS EIN UGGI FYRI TEG???

*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 22. juni | **Tekstur:** | Jóh. 8,2-11 + 6,37b | **Bíbliuorð:** | Dán. 9,9a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 14** *6. juli 2025* **85. árg.**

# Við Lítlu-Petru í loynikamarinum

*Moses Hansen*

Eg var á einum stovumøti. Har sungu vit lovsong, Orðið varð boðað, og so vitnaðu fólk. So bóðu vit fyri torførum viðurskiftum. Vit vænta okkum svar, tí sambært Orðinum er bønin máttmikil og hevur stóra styrki.

Ove Stage var við á møtinum. Hann hevði verið leiðari á frískúlanum í Skovlunde, „Thomasskolen", sum nú hevur fylt 50 ár. Ove segði, at hann gekk ofta túr við Skovmosen og bað Gud geva teimum ein kristnan frískúla. Skúlin hevur 350 næmingar og liggur við Sømosen í dag.

Ove búði á ungum árum í Sakskøbing. Eg eri føddur og uppvaksin í Radsted, 4 km frá Sakskøbing. Ove segði, at hann súkklaði til Radsted at vitja skómakaraeinkjuna, Petru. Hann mintist, at Petra bað fyri soni rossahandlaranum. Tann sonurin var eg.

Mamma sendi meg ofta yvir til Petru við mati. Hon tók altíð ímóti mær í gongini. Eg hugdi forvitin inn í ta lítlu stovuna, sum tóktist mær eitt sindur skýmlig. Eg sá nakrar broderaðar tekstir hanga á vegginum. Tað tóktist heldur løgið. Eftir at eg varð frelstur, skilti eg, at hetta vóru skriftstøð, sum hingu á vegginum.

Petra hevði sagt Ova, at maður sín sat altíð og bað, meðan hann sat og arbeiddi við skóm og tuflum. Tey náddu ikki at síggja, at rossahandlarin, konan og sonurin blivu frelst. Men vit møtast ein dag í Himli, og tá skal eg takka Petru og manni hennara, skómakaranum, fyri teirra forbønir – og takka Jesusi fyri, at Hann leitaði meg upp og frelsti ein syndara sum meg.

Latið okkum ongantíð undirmeta týdningin av bønini. Latið okkum ongantíð siga: „Nú er bara bønin eftir!“ Men latið okkum byrja og enda við bøn og tøkk – og biðja áhaldandi – við ella uttan orð.

Takk Ove, fyri tín vitnisburð. Lívið hjá tær og Evu hevur borið nógva frukt – og øll innheystingin er ikki borin í hús enn.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein afgani vitnar

Ein maður vitnaði uppi í Meinigheitshúsinum í kvøld. Hann segði, at hann hevði hoyrt eitt møti frá Livets Ord í Svøríki.

Teir greiddu frá, at fyrst kom ein bylgja av flóttum úr Afganistan, og nú fræddist, at ein onnur bylgja fór at koma, tí afganar vóru hart sperdir av talibanum. Teir tosaðu so um, hvussu teir sum samkoma kundu hjálpa, og teir komu ásamt um at taka ímóti 150 fólkum, og teir skuldu binda seg til at skaffa bústað og mat til teirra.

Teir gjørdu so av, at teir skuldu fara suður til Grikkalands at taka ímóti teimum, tí har komu teir í land. Teir fóru so og stillaðu seg við skeltum niðri í fjøruni at taka ímóti teimum. Á skeltunum stóð, at teir bjóðaðu sær til at útvega bústað og mat til flóttarnar. Tað endaði við, at teir tóku ímóti 450.

Ein av hesum flóttum vitnaði á møtinum hjá Livets Ord. Hann segði, at eitt kvøldið kom ein eldri talibanur inn til hansara og segði, at hann skuldi hava dóttur teirra til konu. „Tað kanst tú ikki meina, gentan er bara 13 ár,“ segði afganin. „Jú, og gera tit ikki eftir mínum boðum, so skjóti eg alla familjuna. Eg komi aftur í morgin eftir henni.“

Øll familjan lá og svav, bara afganin var uppi. Hann kom í dýrastu neyð, hann fall á knæ og fór at rópa á Allah: „Eg havi so ofta biðið til tín. Ongantíð í lívinum havi eg fingið bønarsvar, men nú mást tú svara mær, tí eg eri í dýrastu neyð!“ Men har hendi einki.

So kom hann at hugsa um, at hann hevði hoyrt, at tey kristnu bóðu til sín Gud, og so helt hann, at hann skuldi royna tað. Straks stóð ein maður framman fyri honum. Maðurin segði: „Vak familjuna og farið av húsinum nú í nátt. Tit skulu fara suður eftir!“ Tey so gjørdu, og har stóðu svenskararnir fyri teimum. Tey komu til Svøríkis, fingu bústað, mat og komu at

ganga í hesi kristnu samkomuni. Gud er undurfullur, og hann sigur, at tað vit gera móti einum av hansara minstu, gera vit móti honum (Matt. 25,40), og tað er ikki lønarleyst.

*Effie Campbell.*

# Lurta nú!

*Moses Hansen*

Summi fólk hava ótta á sær og stúra fyri tíðini, vit liva í – og fyri tí, ið liggur fyri framman. Fara vit at megna hetta? Fari eg at orka hetta?

**Lurta nú**: Um tú hevur givið Jesusi Kristi, Guds soni, lív títt, **so syrgir hann fyri**, at tú kemur tryggur ígjøgnum allar stormar, sum bíða okkum.

**Lurta nú**: „Trúfastur er tann, sum kallaði tykkum, og hann skal eisini gera tað." (1. Tess. 5,24). Hann fer at **føra teg fram á mál**.

**Lurta nú**: „Tí at **ikki hevur Gud ætlað okkum til vreiði**, men at ognast frelsu við harra várum Jesusi Kristi." (1. Tess. 5,9). Tí skalt tú ikki uppliva „stóru trongdina", har Guds rættvísa vreiði dømir eina verð, sum tilbiður satan og verk hansara.

**Lurta nú**: „**Hann, sum er í tær, er størri enn tann, sum er í heiminum**." (1. Jóh. 4,4).

**Lurta nú**: Í Kristusi ert tú fult og heilt sveipaður í Guds kærleika. Um tú kennir tað á tær ella ei, so er tað ein veruleiki. Og Guds kærleiki gevur ikki óttanum nakað rúm. Tvørturímóti! Guds fullkomni kærleiki **rekur út óttan**. (1. Jóh. 4,18).

Ein vaksandi stormur er á veg til okkara verð. Men hasin stormurin eigur ikki at plága teg. Tí tú kennir Hann, sum steðgar stormum. Tá ið lærusveinarnir komu út í harðveður, gav Jesus storminum boð um at steðga – og tað gjørdist blikalogn. Við undran og ærufrykt søgdu teir hvør við annan: „Hvør er hesin maður, at bæði vindur og vatn eru honum lýðin." (Mark. 4,35–41).

**Lurta nú**: Kennir tú henda Jesus, so vilja hesir heimsins stormar ikki rína við teg. Tað verður sum at sletta vatn á gás.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vit síggja tað, sum eingin hevur sæð undan okkum

*Moses Hansen*

Hyggur tú at einum málningi í 100 metra frástøðu, sært tú ongar smálutir. Tú sært fleiri smálutir, um tú bara ert 50 metrar burturi. Men ikki fyrr enn tú stendur bara ein metur frá málninginum, kanst tú rættiliga síggja smálutirnar.

Í mong hundrað ár hava forfedrar okkara staðið yvir 100 metrar frá tí „Profetisku Myndini av Endatíðini", sum Orðið skilliga greiðir frá. Tey hava **lisið** tað, t.d. um endurreisn Ísraels og Jerusalem sum klandursevni hjá øllum heiminum. Tey hava **trúð** tí. Tey hava livað í **vónini**. Tey hava **biðið**. **Men tey hava ikki sæð tað!**

Eg vági mær at siga, at **vit** eru ættarliðið, sum stendur nakrar fáar metrar frá **Guds profetisku mynd av endatíðini** – har, vit **síggja** fleiri og fleiri smálutir. So nógvar smálutir, at tað ikki er burturvið at tala um burturrykkingina.

Í Matt. 24, Markus 13 og Lukas 21 greiðir Jesus í ógvisligum myndum frá tíðini undan afturkomu síni. Og ferð eftir ferð sigur hann: „Tá ið tit síggja … so vita tit, at tíðin er nær!"

Brúka tí tíðina væl – bið, arbeið og gev – og ver til reiðar til Jesu afturkomu – í einum nú, í einum eygnabragdi. (1. Kor. 15,52).

*Effie Campbell* umsetti.

## Lít á Gud – Lívsins sigling er hørð

Eg takki Gudi fyri lyftið, ið okkum er givið í Sálmi 37,24: „TÁ IÐ VIT SNÁVA, FELLA VIT IKKI; TÍ HARRIN HELDUR FAST Í HOND OKKARA."

Hygg **ikki aftur um bak** eftir tí, ið liggur aftan fyri teg, men stríðst staðin fyri fram móti tí, ið **liggur framman fyri** teg.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74